# Jólablaðið

## Jólaredaktiónin:







Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo

# Ársins jólahandil

Lagt til rættis: Ása A. Østerø, Anna Poulsen, Snorri Brend

## Hvat eta tit 1. og 2. jóladag?



*Jóhan Davidsen (55), býr í Havn, men ættaður úr Æðuvík*
Tað er so sum so, einki fast



*Johannes Falkenberg (15), Hoyvík*
Áni tað ikki



*Heri Müller (28), Kvívík*
Jóladag eta vit dunnu. Og 2. jóladag er tað fleskasteik og fekst tjógv á skránni



*Elisabeth Andreassen (15), Hoyvík*
Eg veit ikki rættiliga. Tað plagar at vera sera ymiskt



*Rut Dam (74), Argir*
Tað er so ymiskt. Men ræst kjøt eta vit í øllum førum ein dag.



*Miriam (34), Sandavágur*
Jóladag eru vit hjá vermóður míni, og eta gás. Og 2. jóladag plaga vit at eta fleskasteik og annað gott

## Hvat merkir orðið »jól«?

Jólini eru fyrsta høgtíðin í kirkjuárinum. Jóladagur er 25. desember, og í Føroyum verða tveir jóladagar hildnir sum halgidagar – 25. og 26. desember.

Seinasti dagurin framman undan jóladegi - tann 24. desember - kallast jólaaftan. Hann var fyrr vanligur arbeiðsdagur, men varð roknaður sum halgidagur frá kl. 18.

Nú er jólaaftan frídagur í Føroyum, og mong byrja jólahaldið seinnapart jólaaftan.

### Orðið jól

Orðið jól hevur óvissan uppruna.

Møguliga er tað sama orðið sum hjól, og sipar tá til ársins gongd, ta støðugu endurtøkuna.

Orðið jól er hvørkikynsorð í fleirtali. Vit siga "Jólini, tey..."

*(Kelda: http://fo.wikipedia.org/)*

